TILBOÐ Í ELDING! PÁSKATILBOÐ Í ELDING! PÁSKATILBOÐ Í ELDING!

TILBOÐ

VOSS
KOMFÝRUR
ELK 850 • Glaskeramikk • Yvirpláta: VOSS HE-system (skjótt upphiting og lág orkunýtlsa), 2 x 14,5 cm køkiøkir, 2 x 18 cm køkiøkir, Resthitaindikator á øllum plátum • Ovnur: VOSS Multiovnur við 3-Plus hitaluftsystem (200°C uppá 7 min.), sjálvreinsandi ovnur (58 litrar), toppljós í ovnrúminum, barnatryggja, stór skuffa við rullu/glíðuhjól
Vanl. prísur: 9950,-

8950,00
Spar 1000,-

5950,00
Spar 1250,-

ZANUSSI
KOMFÝRUR
ZCC 6637 W • EL-komfýrur við glaskeramikkplátu • 2 dupult kókiøkir • Yvir/undirhita, varmluft og grill • Clear'n Clean emalja í ovninum •
Vanl. prísur: 7200,-

7790,00
Spar 1110,-

Husqvarna
KOMFÝRUR
Regina Pub 70 - QSG 652 • Yvirpláta úr keramik glasi við 4 kókiøkjum • Stórur rúmligur ovnur sum tekur 55 litra • 3-í-1 ovnur (varmluft, yvir/undirhita og grill) • Emalju á báðum síðum, bakveggi og lofti • Optimal barnasikring • Hædd 90,0 - 85,0 cm, • Breidd 59,6 cm • Vanl. prísur: 8900,-

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

Toll- og Skattstova Føroya

Størv sum málsviðgerar

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skudarinnkreving hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrilsvegi, Posttollurin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

Heimasíða: www.tollskatt.fo

E-mail: streymoy@tollskatt.fo

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru trý størv leys at søkja til setan 1. juni 2002, ella so skjótt til ber. Eitt fast starv fulla tíð, eitt fast starv hálva tíð og eitt starv sum avloysari í 1 ár fulla tíð.

Øll størvini eru á Eftirlits- og innheintingardeildini. Høvuðsuppgávurnar eru eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt og toll, herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

Førleikakrøv
Tey, sum sett verða í fulltíðarstørvini, skulu hava roknskaparligan førleika, so sum cand. merc., HA, HD ella líknandi útbúgving.

Tann, sum settur verður í hálvtíðarstarvið skal hava roknskaparligan førleika, so sum merkonom ella líknandi útbúgving.

Harumframt skulu nýggju fólkini vera fyrikomandi og arbeiðssom og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Vit kunna bjóða
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. trý sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

Setanartreytir
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Hallbjørg Hansen á tlf. 310260.

Umsóknir
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

29. apríl 2002

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn



- Landarar!!!

P/F SNODD, søkir eftir fólki til at landa, brúk er fyri, 6-8 fólkum at byrja beinanvegin.

Áhugaði kunna venda sær til:

Skrivstovuna	44 99 94
Dánial	21 25 60
Jóhannus	21 70 60

P/F SNODD
Tel. +298 44 99 94 - Fax. +298 44 91 19 - e-mail. snodd@snodd.fo

Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Sinnisbata verður á Hotel Hafnia leygardagin 11. mei kl. 14.00.

Skrá sambært lóg felagsins.

Uppskot skulu verða nevndini í hendi 14 dagar áðrenn aðalfundin.

SINNISBATI

Eysturoyar Teoriskúli

Um nóg nógv tekna seg, verður endurtøkuskei 19. og 20. apríl
Endalig roynd verður 29. apríl



an eder tel
le ykke tel
ug ristiansen tel

Sosialurin

Leikhúsið Gríma
sýnir leikin

Góðir dagar

eftir Samuel Beckett
leikstjórn Eyðun Johannessen
á Meiarínum

hóskvøldið	**11.04.2002**	**kl. 20.00**
fríggjakvøldið	**12.04.2002**	**kl. 20.00**
leygardagin	**13.04.2002**	**kl. 18.00**
sunnudagin	**14.04.2002**	**kl. 18.00**

Atgongumerkir á kr. 100,– fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleiri fáa 20% avsláttur.

Tvingsilssøla

Hósdagin 2. mai 2002, kl. 09.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 180, Elduvík (AS nr. 2.39/2001).**

Sambært tinglýsingini er økið á matr. nr. 180 Elduvík til støddar 501 m².

Húsini hava stoypta grund, eru annars gjørd úr timbri. Takið er úr aluminium. Húsini eru ikki í góðum standi. Um húsini er annars at siga:
Húsini eru í 2 hæddum og hava ovastaloft. Ovara hædd: køkur, wc, 3 kømur og stova, gongd + trappa til niðaru hæddina tilhoyrandi hjallur.
Niðara hædd: 2 gangir, 1 kamar, 1 kjallararúm 1 wc v/ brúsu.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 44315.01)**, sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur, tann 9.4.02.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Starvsfólk til heilsu- og umhvørvisdeildina

Søkt verður eftir starvsfólki til nýggju heilsu- og umhvørvisdeildina hjá Tórshavnar kommunu.

Førleikakrøv
Umsøkjarin skal hava útbúgving sum verkfrøðingur ella líknandi útbúgving innan heilsu- og umhvørvi.

Royndir
Tað er umráðandi, at umsøkjarin hevur royndir innan arbeiðið við heilsu- og umhvørvismálum og innan almenna fyrisiting.

Persónligir eginleikar
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:
- kann arbeiða sjálvstøðugt og hugsa skynsamt
- er fyrikomandi
- virkar í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur sum arbeiða hjá kommununi.

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfr. ella Marius Müller, tekn. stjóra á tlf. 31 51 60.

Kommunan bjóðar
eitt áhugavert starv, har tú kanst vera við at seta dám á arbeiðslagið á deildini.

Umsókn
saman við tilmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2002. Viðmerkjast skal á brævbjálvan: "umsókn um starv til heilsu- og umhvørvisdeild".

SNARSKIVAN

TILBOÐ Í ELDING! TILBOÐ Í ELDING! TILBOÐ Í ELDING!

TILBOÐ

AVMARKA NØGD!

6690,00
Spar 1480,-

4490,00
Spar 830,-

ZANUSSI
KØLI-/FRYSTISKÁP
BKF 355 • Rúmd køl, brutto/netto, ltr.: 174/173 • Rúmd frost, brutto/netto, ltr.: 61/57 • El-nýtsla pr. døgn/ár, kWh: 1/365 • Orkuflokkur: B/lágorka • Stødd, HxBxD í mm: 1400x550x600 • Vanl. prísur: 5320,-

VESTFROST
KØLI-/FRYSTISKÁP
BKF 355 • Stødd: 185x59,5x59,5cm
• Vanl. prísur: 8170,-

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

veitst tú ikki tað?



Handverkarir

Søkt verður eftir dugnaligum handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrki.

demich **Ring á tlf. 21 10 71**

Bilmekanikkari søkist

Søkt verður eftir bilmekanikkara at byrja beinanvegin.

Bilfríðkan
tlf. 317300 / 217300
Spyr eftir Ludvík

FIAT

Maskinmeistarar
søkjast

Søkt verður eftir tveimum maskinmeistarum til at vera feriuavloysarar í summar á elverkinum hjá SEV í Suðuroy, ynskt verður, at viðkomandi kann byrja um mánaðarskiftið mai/juni og vera í starvi til uml. mánaðarskiftið september/oktober í ár.

Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving.

Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsaldri sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Palla Mortensen, verksmeistara á elverkinum í Suðuroy um skrivstovu okkara í Vági, tlf. 373016 ella til skrivstovu okkara í Tórshavn, tlf. 311366.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postrúm 319
110 Tórshavn

Aðalfundur

Aðalfundur hjá Eiðis Arbeiðsmannafelag verður í matarhøllini á Norðís 27. apríl kl. 19.00.

Skrá sambært løgum felagsins.

Nevndin

Vaskifólk

Søkt verður eftir 2 vaskifólkum til skúlan í Runavík.

Skrivlig umsókn skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2002.

Runavíkar býráð